# Strategi hjá Føroyamálsdeildini (FMD) 2010-2015

## Gransking

Granskingin verður styrkt innan navnafrøði, máltøkni og fjølmiðlafrøði.
Meiri dentur verður lagdur á at lýsa granskingina, harí bæði møguleikar og forðingar. Tíðarætlanir og ávegisfrágreiðingar eru arbeiðsamboð, ið eiga at vera tøk. Granskarar, sum hava havt fulla undirvísingar- (undirvísing á øðrum deildum á Setrinum verður íroknað) og umsitingarskyldu í trý lestrarár, kunnu søkja um frí frá hesum skyldum í ½ lestrarár fyri at granska fulla tíð og eiga, um til ber, at fáa tað.

Endurnýgging av granskarabólkinum
Nýggír granskarar eiga at verða settir í starv ikki seinni eitt eitt ár, áðrenn verandi granskarar fara frá fyri aldur fyri at tryggja, at serfrøði og servitan á høgum stigi verður handað næsta granskaraættarliði.

Nýggj størv
Tað eru tíggju ár síðan granskari varð settur í starv á FMD, og tey komandi 5 árini eiga tríggir málfrøðingar og ein fjølmiðlafrøðingur at setast í nýggj størv:

*Staðanavnafrøðingsstarv*. FMD hevur frá myndugleikunum fingið ábyrgd av hesum øki og hevur formannin og 2 aðrar limir í nýggju staðanavnanevndini, sum Mentamálaráðið hevur sett. Granskari verður settur at røkja hetta staðanavnasavnið á FMD, standa fyri talgilding og útgávu av øllum føroyskum staðanøvnum.

*Fjølmiðlafrøðingsstarv*. Føroyar hava onga gransking av høvuðsmiðlunum fyri mál, bókmentir og aðra mentan, nevniliga fjølmiðlum. Fjølmiðlar eru tó partur av náminum á FMD, tí annað hevur verið hildið óráðiligt, og leysalærarar hava ta undirvísingina. Áðrenn 2015 eigur tann fyrsti fjølmiðlafrøðingurin at setast at granska og leggja nám í fjølmiðlafrøði til rættis.

*Málfrøðingsstarv*. Málfrøðingar á FMD eru smábýttir millum at granska, skriva orðabøkur og lærubøkur og undirvísa. Áðrenn 2015 eigur ein málfrøðingur at setast til at granska nútíðarmál, leggja til rættis fult nám í føroyskum fyri útlendingar og standa fyri altjóða summarskeiði.

*Máltøknifrøðingsstarv*. Í endurhugsanini av gransking og útbúgving á FMD er máltøknifrøði neyðug. Samstarv við KT-deildina., m.a. í sambandi við at seta stjøtul á fjarnám. Eitt starv verður sett í máltøknifrøði.

Miðlan og samskipan av gransking
Granskingaravrikini, sum verða løgd fram í bókum og greinum í føroyskum og útlendskum vísindaritum, bæði prentað og talgild, verða gjørd sjónligari í tí almenna rúminum í Føroyum.
Eitt yvirlit eigur at vera tøkt yvir loknar, verandi og komandi granskingarætlanir. Ein mentan eigur at alast fram, sum fremur opinleika og umrøðu um granskingina og harvið stimbrar hana og lættir um at taka felags tøk og leggja felags ætlanir.

## Søvn

Miðið er, at allar heimildir skulu vera atkomuligar. Søvnini á deildini - orðasavn, staðanavnasavn, bandasavn og handritasavn – verða gjørd atkomulig við nútímans tøkni, so at granskarar og studentar fáa arbeitt við teimum á teldu, tí søvnini eru avgerandi granskingartilfar á øllum virkisøkjum á FMD. Arbeiðið, sum er í gongd við talgilding heldur fram, og ein ætlan verður løgd fyri alla arbeiðsgongdina og fíggingina ár um ár, sum vísir, hvussu vit koma á mál innan fyri komandi 5 ár.

## Tøkni

Tøknin eigur at raðfestast.Teldurnar eiga støðugt at vera dagførdar, verandi forrit eiga at virka, sum tey skulu, og tey, ið eru neyðug aftrat eiga at verða keypt. Granskarar og granskingarhjálparar eiga at fáa dagføring í at brúka forritini rætt, at leggja inn, leita, prenta o.a.t. Deildin eigur at hava sítt egna teldufólk fulla tíð.

# Útbúgving

## Skeið á øðrum deildum og felagsskeið

Størri valmøguleikar og fjølbroytni í verður náminum, tí tað verður møguligt og høgligt hjá studentum at taka skeið á øðrum deildum og fáa tey góðskrivað á FMD eftir greiðum mannagongdum.

*Skeið á øðrum deildum* eru skeið, sum studentar søkja um at fáa góðkend sum part av námi á FMD.

*Felagsskeið* eru løgd til rættis sum skeið fyri studentar á meir enn einari deild. Tey eru samnýtsla av tilfeingi og skapa samband millum studentar á ymiskum deildum. Tey eru kravd skeið ella valskeið. Í hvørjum føri er greitt, um skeiðið gevur stig og hvussu nógv stig. Felagsskeið eru:

<u>Skeið fyri pisur</u>: Pisuskeið; skeið í almennum vísindaástøði; rættskriving; uppgávuskriving; KT.
<u>Hugvísindalig skeið:</u> Hugvísindaligt vísindaástøði, hugvísindalig uppgávuskriving. Hugvísindalig KT.

## Ph-d.-nám

Endurnýgging og menning av gransking av føroyskum máli og mentan verður tryggjað við at birta upp undir ph.d.-verkætlanir á deildini. Vit lýsa hvørt ár eina ph.d.-verkætlan um eitt evni, sum deildin leggur dent á (t.d. fjølmiðlar, máltøknifrøði, gerandismál). Á henda hátt skapa vit eitt umhvørvi fyri ph.d.-studentar á deildini.

## Lestrarvegleiðing

2 MA-studentar arbeiða partstíð sum lestrarvegleiðarar.

### Lýsing av tímatalvum og lestrarevnum

Tímatalvur verða gjørdar og kunngjørdar ½ ár frammanundan í samráði við studentar. Lestrarevni aftan á støðisnám verða vald, lýst og kunngjørd 1 ár fram í samráði við studentar.

### Nýggj nám

BA-nám í fjølmiðlafrøði verður stovnað. Námið skal veita vitan og førleika á hesum øki, sum er so avgerandi í okkara tíð. Eitt lektarastarv og eitt adjunktstarv skulu til (sí Nýggj størv).

Ársnám í føroyskum máli, bókmentum og mentan fyri útlendskar studentar verður stovnað. Hetta er neyðugur partur av menningini av føroysktnáminum. Eitt lektarastarv og eitt adjunktstarv (sí Nýggj størv).

### Fjarlestur

Sjøtul verður settur á fjarlestur í føroyskum. Eitt starv (sí Nýggj størv).

### Studentatal

Studentatalið hækkar úr 35 studentum 2009-10 til 65 í 2015. Tað nýggja samstarvið millum deildir, tey nýggju námini og tilboðið hava henda vøkstur við sær.Harumframt ger betri marknaðarføring og lestrarvegleiðing, at fleiri studentar taka núverandi nám.

## Eftirmeting og góðskutrygging

Eins og undirvísing og granskingarætlanir skulu vera fyrireikaðar, skulu tær eisini eftirmetast.

Í undirvísingini eigur góðskumeting altíð at byrja longu ein mánað eftir, at skeiðið er byrjað, og tá ið tað er lokið, fylla studentarnir út oyðiblað við spurningum um undirvísingina. Leiðslan tekur støðu til eftirmetingarskjølini. Góðskan í úrslitum av undirvísing og námi verður tryggjað við uttanseturspróvdómarum til minst 2/3 av próvtøkum í BA- og MA-námi.

Tá ið verkevni og granskingarverkætlanir verða skilmarkaðar, antin tey eru fíggjað av Setrinum ella við serligari fígging, eiga tær at hava ein leiðara, sum hevur ábyrgd fyri gongdini í arbeiðinum.

## Leiðsla

Leiðslan eigur at vera støðug og ikki ov skiftandi. Týdningarmikið er, at leiðslan virðir øll starvfólkini, at hon vísir áhuga fyri, hvat hvør ger og fylgir upp. Trivnaður hongur saman við motivering og at vera hoyrd. Opinleiki og kunning eru lykilorð fyri gott samskifti.

Leiðslan má seta yvirskipað mið fram og fylgja teimum á mál. Skal Setrið hava so nógvar studentar sum møguligt? So nógvar granskarar sum møguligt? Miðla so nógv sum møguligt? Røkja og miðla søvnini so nógv sum møguligt?

Tað er umráðandi, at sama regla um granskingarhálvur verður galdandi fyri allar deildir.

Stýrið og setursumsitingin eiga at vera sjónligari. Øll mugu kenna infrastrukturin og vita, hvar tey sjálv eru staðsett í honum (fyritreytin aftur her: opinleiki og kunning). Kunningin á Setrinum nýggja má bøtast og greiðar mannagongdir gerast.

## Fíggjarumsiting

FMD fíggjar við Nordplus. Hvør syrgir fyri aðrari fígging? Fíggjarleiðarin? Dekanar?

Miðfyrisitingin eigur at hava eina funktión, sum tekur sær av fíggjarútvegan og støðugt hjálpir til við at útvega uttansetursfígging til verkætlanir á stovninum. Tað er ein fortreyt fyri menningarmøguleikum, at fólk verða sett við, bæði 1) á økjum, ið verða løgd inn av nýggjum, og 2) tá ið starvsfólk fara frá við eftirløn. Tað átti at verið ein vælvirkandi depil, sum hjálpti til við at útvega fígging.

## Húsaviðurskifti á Fróðskaparsetrinum

Trong húsaviðurskifti gera sítt til at bremsa menningarmøguleikum á stovninum.

Fyri at Setrið nýggja skal merkja nakra styrking av samarbeiði sum fylgju av samanleggingini, hevði tað verið best, at deildirnar vóru undir sama taki - ella dyr um dyr í einari bygninga-samstøðu á einari Seturstrøð við øllum hentleikum: Fyrilestrarsalum, undirvísingarhølum, serhølum, starvsstovum, *felags tíðarhóskandi bókasavni*, skjalagoymslu, fimleikahøll, matstovu, studentagarði, granskaraíbúðum o.ø.

Eyðvitað mugu vit raðfesta *vísindaligt bókasavn* fremst á hesum ynskilistanum, tí bókasavnsviðurskifti okkara mugu dagførast! Føroya Landsbókasavn má sum skjótast talgilda síni søvn og dagføra sítt úrval av vísindaligum bókum. Eins og fyri FMD má miðið fyri alt umhvørvið vera, at Landsbókasavnið og Skjalasavnið gera allar heimildir sínar atkomiligar.

## Samanumtikið um Setrið nýggja

Neyðugt er at hugsa um Setrið sum eina heild, og tá ið tað ber til lata tað vera støðið undir øllum atgerðum og átøkum.

Tær skipanir, sum eru, verða tillagaðar í mestan møguligan mun, so at studentar kunnu taka partar av náminum á øðrum deildum enn, teir eru innskrivaðir á. Samstarvið eigur hava við sær kompleksitet og smidleika allan vegin í bygnaðinum á náminum. Vit seta okkum tað mál, at vit um 5 ár men helst fyrr, hava samskipað tað nýggja Setrið so mikið, at samstarvið speglast í teimum útbúgvingum, sum kunnu takast á samanlagda stovninum.

Tillagingar til Setrið nýggja mugu ikki vera á kostnaðin hjá teimum dygdum, sum deildirnar hava frammanundan.

Studentar eru við á øllum stigum, t.d. tá ið tímatalva verður løgd. Langt komnir studentar skipa fyri pisuskeiði.

Skipað verður felags lestrarvegleiðing fyri Setrið. Tað vísir seg, at gloppið frá miðnámsskúla til Fróðskaparsetrið er stórt, og serliga hava nýstudentar tørv á vegleiðing. Góð lestrarvegleiðing kann gera, at færri studentar falla frá. Tí eiga útbúnir lestrarvegleiðarar at setast í starv.

Ein liður í at tryggja framhaldandi menning er, at hava studentarnar við í ráðum og lata teir hava ávirkan á sum flestum stigum. Tað skapar tokka og varðveitir áhuga teirra eftir lokið nám, soleiðis at teir verða verandi stuðlar og talsmenn hjá Setrinum.

Ársfrágreiðing Fróðskaparsetursins vísir greitt, hvat er avrikað í árinum og hvussu tað svarar til sett mál og stavnhald.

---

Frammanstandandi er skrivað saman eftir frágreiðingum frá starvsbólkafundum og umrøðu á felagsfundum umframt innkomnum viðmerkingum heystið 2009 og veturin 2010.

Turið Sigurðardóttir, dekanur, Føroyamálsdeildin.
5. februar 2010.